## Gates: iPod er ótrúligur

Hóast Microsoft júst er komin á marknaðin við Zune, sum av fleiri verður róptur fyri iPod-killer, so tykist Bill Gates ikki rokna við, at teir megna at senda útgávuna frá Apple í grøvina. Partvíst, so hevur sølan av Zune ikki verið so serstakliga stór, síðani hesin kom á amerikanska marknaðin, og hartil sigur Microsoft-stjórin sjálvur, at iPod er nakað fyri seg. Ófatuligt og fantastiskt var millum lýsingarorðini, sum Bill Gates nýtti, tá hann herfyri varð biðin um at siga sína hugsan um iPod.




## Gates enn ríkastur

310 mia kr. Tað er tað, sum samlaðu ognirnar hjá Bill Gates eru gjørdar upp til, nú hann enn einaferð stendur ovastur á amerikanska ríkmannalistanum. Samlaði listin við 15 teimum ríkastu, stendur nú at lesa á síðuni hjá Føroya Banka, og telur listin eisini eigararnir handan Dell, Oracle og Google. Vert er eisini at leggja til merkis, at Walton-familjan, sum eigur Wal-Mart ketuna, er sera væl umboðað á listanum. Ikki færri enn fimm limir í familjuni standa á listanum.

# 10 føroyskir framsýnarar á Polarfish




*Vónin hevði sín egna bás á Polarfish.*




*AWI Boats í Runavík var millum framsýnararnar á føroyska básinum.*



*Frá básinum hjá Oilwind í Miðvági.*




*Menningarstovan hevði part av føroyska básinum.*

**Fyri fjórðu ferð hevur fiskivinnuframsýning verið í Sisimiut í Grønlandi**

FISKIVINNA

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*
*Myndir: S. í Dali*

Eins og í Føroyum er fiskivinnan tann berandi vinnan í Grønlandi, og hóast tosað verður um aðrar vinnur, verður fiskurin helst álitið í mong ár afturat.

Eingin fiskivinnutjóð uttan fiskivinnuframsýningar, og soleiðis eisini í Grønlandi. Um vikuskiftið varð fyri fjórðu ferð skipað fyri framsýningini Polarfish í Sisimiut, sum er næststørsti býur í Grønlandi. Býurin er sera virkin á vinnuøkinum og hevur stóra havn, har tað størsta rækjuvirkið í Grønlandi eisini er.

Framsýningin var í ítróttarhøllini í býnum, og framsýningarøkið var um 1.000 fermetrar. Tíggju føroyskir luttakarar vóru millum framsýnararnar. Níggju teirra vóru á einum felags føroyskum bási, sum Petur & Petur hevði skipað fyri. Teir níggju framsýnararnir á føroyska básinum vóru Tórshavnar Skipasmiðja, FJM, AWI Boats, MP-Teknik, North Atlantic Fish Fair, Sea Star Føroyar, Oilwind, Klaksvíkar Kommuna og Menningarstovan.

Trolvirkið Vónin, sum eigur fleiri trolvirkir í Grønlandi, hevði sín egna bás.